# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Bin Laden brúkar so nógva orku til sína egnu trygd, at hann hevur næstan einki við virksemið hjá al-Qaeda at gera nú*

*CIA-stjóri*

# ES mælir til meiri kjarnorku

**ES heldur, at kjarnorka hevur stóran týdning í royndunum at tryggja øllum nóg mikið av orku**



*Kjarnorkuverkið í Oskarshamn í Svøríki*

*Mynd: Aftenposten*

Í gjár legði ES-nevndin fram eina 1.000 síður drúgva frágreiðing um orkupolitikkin í samveldinum og uppskotum um, hvat er rættast at gera frameftir. Tann reyði tráðurin í frágreiðingini og uppskotunum er, at londini mugu avmarka orkunýtsluna og økja sína orkuframleiðslu fyri at avmarka tørvin á at keypa orku aðrastaðni.

Harumframt mælir nevndin limalondunum til at styrkja innanhýsis gassmarknaðin við tí endamáli at hjálpa teimum londunum, sum bara hava gass úr Russlandi at dúva uppá. Í løtuni eru tað seks ES-lond, sum bara hava Russland sum gassveitara, men við at leggja nýggjar leiðingar kunnu londini fáa gass úr eitt nú Noregi og Algeria.

Men ES-nevndin leggur eisini stóran dent á at útbyggja kjarnorkuna. Nevndin skrivar í frágreiðingini, at kjarnorka er ein av teimum burðardyggastu orkukeldunum og verður ikki ávirkað av prísbroytingum á ráevnum. Tað ber í sær, at ein útbygging á hesum økinum kann verja ES ímóti skiftandi ráværuprísum, skrivar nevndin.

### Vilja hava kjarnorku

ES-nevndin sigur, at undirtøkan fyri kjarnorku er veksandi í ES-londunum. Nevndin hevur leingi hildið uppá, at kjarnorka fer at hava ein týðandi lut í orkuveitingini í ES-økinum í framtíðini, men hon ger vart við, at tey einstøku limalondini skulu velja, hvørja orku tey vilja hava.

Orkupolitikkurin fyllir altsamt meiri á altjóða politiska pallinum, og orka er eisini eitt av høvuðsevnunum á toppfundinum millum ES og Russland í hesum døgum. Russland er í løtuni tað landið, sum letur ES mest gass, og ES-nevndin sigur, at russiska gassveitingin fer at veksa líka til 2020, um ES ikki tekur stig til at avmarka tørvin á at keypa gass úr Russlandi.

Formaðurin í bES-nevndini, José Manuel Barroso, segði í gjár, at ES hevur sett sær sum mál at fáa altjóðasamfelagið at taka undir við einari umhvørvissemju á ráðstevnuni, sum verður í Keypmannahavn næsta heyst. Hann legði afturat, at tað slepst ikki undan at tosa um umhvørvi, tá tað snýr seg um orku og øvugt.

## STUTT SAGT

### Størsta arbeiðsloysi í 25 ár

Tað tykist ikki, sum at tey vánaligu hagtølini frá amerikonsku myndugleikunum vilja taka nakran enda. Í gjár varð boðað frá, at 65.000 amerikanarar mistu arbeiðið í síðstu viku, og at nú eru 3,9 milliónir amerikanarar arbeiðsleysir.

Talið umfatar tey, sum hava fingið arbeiðsloysisstuðul í minst eina viku, og hetta er tað størsta arbeiðsloysistalið síðani 1983, skrivar AP.

### Sluppu ikki til Gaza

Ísraelsku myndugleikarnir noktaðu í gjár 20 umboðum fyri ES at fara til tað palestinska økið Gaza. Upprunaliga skuldu ES-umboðini til Gaza fyri einari viku síðani, men tey fingu boð frá ísraelsku myndugleikunum at bíða eina viku. Men tá tey royndu aftur í gjár, sluppu tey ikki kortini, skrivar ísraelska blaðið Ha'aretz.

Talsmenn hjá ísraelska hervaldinum siga við blaðið, at ES-umboðini sluppu ikki til Gaza, tí ísraelska fregnartænastan hevur fingið frænir av, at víðgongdir palestinar har hava ætlanir eru um yvirgang í økinum.

### Fjaldi myndatól í vekjaranum

Rætturin í bretska býnum Swansea dømdi í gjár ein 18 ára gamlan drong sekan í kynsligum ágangi. Hann hevði fjalt eitt tráðleyst vevmyndatól inni í einum vekjara, sum hann so gav einari kvinnu, sum hann kendi. Kvinnan hevði vekjaran í kamarinum, og umvegis internetið kundi tann 18 ára gamli so halda eyga við henni í teldu síni, tá hon var inni í kamarinum.

Nakað seinni fekk kvinnan sms-boð, sum millum annað snúðu seg um klæðini, sum hon gekk í. Hon boðaði løgregluni frá, og inni í kamari hennara fann løgreglan vevmyndatólið í vekjaranum. Tá løgreglan fór heim til tann 18 ára gamla mannin, fann hon fleiri túsund myndir og kykmyndir av kvinnuni.

Tann 18 ára gamli játtaði seg sekan. Dómarin gjørdi av, at hann skal sita 18 mánaðir í fongsli, og at navn hansara skal standa á listanum við kynsligum ágangsmonnum tey næstu 10 árini.



*Sjóverjuskipini Ægir og Týr við bryggju í Reykjavík*

*Mynd: Morgunblaðið*

# Uppsagnir í íslendsku sjóverjuni

Fíggjarkreppan í Íslandi rakar nú eisini sjóverjuna og bjargingartænastuna. Morgunblaðið skrivar, at 12 fólk har eru søgd úr starvi við teirri grundgeving, at játtanin til raksturin røkkur ikki, tí virðið á krónuni er fallið so nógv. Ein talskvinna hjá sjóverjuni sigur við blaðið, at roynt verður at skerja virksemið sum minst, men at tað millum annað verða færri eftirlitsflogferðir í komandi tíð. Umleið 180 fólk arbeiða hjá Landhelgisgæslu Íslands, sum stovnurin eitur.

# USA risastórt hall í oktober

**Í síðsta mánað hevði USA næstan 50 milliardir krónur í halli í meðal um dagin, og tað er nýtt met**



*George W. Bush hevur ikki verið heppin við at halda tær seinastu játtaninar*

*Mynd: AP*

USA hevði meiri ennm 1.500 milliardir krónur í halli á fíggjarlógini í oktober mánað, og so stórt hall hevur tað almenna har ikki havt fyrr. Oktober er tann fyrsti mánaðurin í fíggjarárinum 2009, og fíggjarmálaráðið í Washington sigur, at so vánaliga byrjan hevur einki fíggjarár havt í landsins søgu.

Oman á hetta hallið kemur, at farna fíggjarár brúkti USA einar 3.000 milliardir krónur meiri til hernaðarmál, enn játtað var á fíggjarlógini 2008.

Ein orsøk til tað óvanliga stóra hallið í oktober er, at stjórnin noyddist at brúka meiri enn 700 milliardir krónur til at hjálpa fíggjarmarknaðinum. Goerge W. Bush, forseti, hevur sagt, at hann og stjórnin fara at brúka tað, sum svarar til einar 4.500 milliardir krónur til at steðga afturgongdini í lansins búskapi.

Enn torir eingin at siga, hvussu stórt hallið á fíggjarlógini fyri 2009 verður, men summir serfrøðingar siga, at tað kann koma upp á einar 6.500 milliardir krónur.

Barrack Obama hevur lovað at gera alt fyri at fáa búskapin aftur á rættkjøl, men eygleiðarar siga, at uppgávan verður ovurstór, tí í veruleikanum er kreppan júst byrjað, siga teir.